# FERÐA-
# VINNU-
# ÆTLAN

fyri kommunurnar í Norðoyggjum

VISIT
NORTH

# *Kommunalar ferðavinnuætlanir*

Øllum kommunum er álagt at gera ferðavinnuætlan sambært løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu. Sambært lógini skulu kommunalu ferðavinnuætlanirnar eisini mennast í samstarvi við borgarar á staðnum, bøndur og aðrar viðkomandi partar.

Kommunala ferðavinnuætlanin hevur til endamáls at menna og fyriskipa ferðavinnu á staðnum soleiðis, at hon minst møguligt ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv. Samstundis skal ætlanin styrkja lokala sjálvræði við at økini sjálvi og kommunan sum myndugleiki seta karmarnar fyri, hvussu ferðavinnan í økinum skal virka innan lógarásettu karmar.

Miðað verður eftir, at allir lutir í ferðavinnuni verða skipaðir á burðardyggum grundarlagi, soleiðis at náttúra, tilfeingi, siðvenja, fólkaræði, trivnaður, inntøkur og vinnumøguleikar verða vard, ment og, har tað er neyðugt, endurbøtt.

Kommunurnar hava heimild at fyriskipa og regulera ferðavinnuvirksemið í økinum. Hetta merkir, at tær kunnu áseta avmarkingar og skilhaldsreglur, sum eru galdandi fyri øll, ið ferðast í økinum – bæði føroyingar og útlendingar.

### Ferðafólk

Ferðavinnulógin er ikki galdandi fyri fólk, sum búgva í Føroyum, men fyri øll ferðafólk. Sambært lógini er eitt ferðafólk eitt fólk, sum hvørki hevur bústað ella fulla skattaskyldu í Føroyum, og sum í sambandi við frítíð ella vinnu er burturi frá heimstaði sínum fyribils og í meira enn 24 tímar.

Ferðavinnulógin ásetur, at við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi ætlan, kunnu **ferðafólk** bert ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á bygdagøtum, útvaldum hagagøtum og strondini, sum myndar markið millum land og sjógv. Tað er Visit Faroe Islands, sum almannakunnger og merkir farleiðirnar.



# Ferðavinnuætlan fyri kommunurnar í Norðoyggjum

**Felags samstarv um ferðavinnu**

Kommunurnar í Norðoyggjum, undantikið Fugloyar kommuna, hava valt at samstarva um at menna eina felags ferðavinnuætlan. Endamálið við samstarvinum er at menna felags loysnir og ætlanir fyri, hvussu ferðavinnan í Norðoyggjum kann mennast á ein burðardyggan og skipaðan hátt, sum gagnar bæði lokalsamfeløgunum, vinnuni og vitjandi. Samstarvið byggir á eina felags fatan av møguleikum og avbjóðingum í økinum og eitt felags ynski um at styrkja Norðoyggjar sum eitt spennandi og væl skipað ferðamál.

Visit North, sum umboðar allar kommunurnar í Norðoyggjum, hevur samskipað arbeiðið við ferðavinnuætlanini. Starvsfólkini hava gott innlit í tilboð og møguleikar á øllum seks oyggjunum og vegleiða dagliga ferðafólki um alskyns viðurskifti, og virka sum bindilið millum einstøku økini í Norðoyggjum og ferðafólk.

Í arbeiðinum við at menna eina ferðavinnuætlan hevur Visit North vegna kommunurnar arbeitt miðvíst og skipað fyri at liva upp til tey krøv, sum Landsstýrið hevur álagt kommununum. Samstundis er dentur lagdur á at taka viðkomandi viðurskifti og atlit at ferðavinnuni við í tilgongdina. Endamálið er at menna eina fjøltáttaða ferðavinnuætlan, sum umboðar einstøku økini, visjónirnar hjá lokalum áhugapørtum og tær ítøkiligu ætlanirnar og raðfestingarnar, sum kommunurnar hava sett út í kortið.

Eisini hevur Visit North í 2024 gjørt eina ferðavinnustrategi fyri Norðoyggjar saman við kommununum, har dentur var lagdur á, at øll átøk í lokalsamfelagnum skulu fremjast í samráð við heimafólkið og við atliti at eini ábyrgdarfullari og burðardyggari ferðavinnu. Síðani hevur Visit North arbeitt miðvíst at røkka settum málum.

Fleiri mál eru rokkin, men framvegis verður arbeitt við at røkka málum, herundir málinum um, at øll øki - oyggj, bygd og býur - hava nakað at bjóða ferðafólki. Arbeitt hevur verið við serligum atliti til burðardygd og inntøkuvøkstur, umframt ta fortreyt, at hvørt øki hevur nakað serstakt, sum eyðkennir tað og ger júst tað økið meira áhugavert og lokkandi.







**Bygnaður og skipan**

Ferðavinnuætlanin fevnir um Svínoy, Viðoy, Borðoy, Kunoy og Kalsoy - eitt víðfevnt geografiskt øki við ymiskum ferðavinnutrýsti og stórum menningarmøguleikum. At kommunurnar samstarva um karmar og skipan av ferðavinnuni skapar eitt sterkt grundarlag fyri at menna eina felags strategiska kós fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum.

Visit North umboðar allar kommunurnar í økinum, samskipar arbeiðið við ferðavinnuætlanini og virkar sum bindilið millum lokalsamfeløg, vinnu og ferðafólk. Harumframt umboðar Visit North Norðoyggjar í samstarvinum við Visit Faroe Islands, sum styrkir samanhang, ráðgeving og felags menningartilgongdir. Hetta samstarvið gevur góðar fortreytir fyri felags raðfestingum, greiðum leiðreglum og einari samanhangandi menning av ferðavinnuni í økinum.

Ferðavinnutrýstið er ymiskt í einstøku økjunum, tískil eru tørvir, møguleikar og tilboð eisini ymisk. Av hesi orsøk er ferðavinnuætlanin skipað í partar, sum lýsa serstøku viðurskiftini, menningarmøguleikar og átøk fyri hvørt øki sær.

Ferðavinnuætlanin er býtt upp á hendan hátt:

- Strategisk menning og felags karmar í Norðoyggjum
- Hvannasunds kommuna
- Klaksvíkar kommuna - Kalsoy
- Klaksvíkar kommuna - Klaksvík, Ánirnar, Norðoyri og Árnafjørður
- Klaksvíkar kommuna - Svínoy
- Kunoyar kommuna
- Viðareiðis kommuna

# Strategisk menning og felags karmar í Norðoyggjum

**Menningarmøguleikar í ferðavinnuni**

Ferðavinnulógin avmarkar hvar ferðafólk í Føroyum kunnu ferðast undir egnari ábyrgd. Tí er umráðandi at menna alternativ ferðavinnutilboð, sum bæði styrkja vinnuna í økinum og samstundis stuðla undir, at ferðafólk virða tær avmarkingar, sum eru ásettar í lógini.

Ferðavinnan er eitt týdningarmikið amboð til at skapa livandi og burðardygg lokalsamfeløg, har trivnaður, vøkstur og menning ganga hond í hond. Ein væl skipað og ábyrgdarfull ferðavinna kann skapa nýggjar arbeiðsmøguleikar, styrkja lokala vinnu og økja um samleikan og stoltleikan hjá borgarunum. Samstundis gevur hon møguleikar at vísa fram okkara serstøku náttúru, mentan og mentanararv.

Við vaksandi áhuga fyri Føroyum sum ferðamál, er tørvur á at skipa og stýra menningini, so hon kemur bæði borgarum og vitjandi til góðar. Ferðavinnan kann virka sum ein drívmegi fyri íverksetan, mentanarlív og sosialum lívi og kann eisini vera við til at halda ungdóminum knýttum at heimstaðnum.

Tískil eru nógvir ágóðar av eini væl skipaðari ferðavinnu, eitt nú at hon økir um mentanarlig og sosial tilboð, stimbrar íverksetan og lokalar vinnur, kann skapa arbeiðspláss, styrkir samleika og stoltleika hjá borgarum, og ger økið meira sjónligt og áhugavert bæði innan- og uttanlands.

Grundarsteinurin í góðari ferðavinnu er at ferðafólk, vitjandi og teir borgarar, sum liva og virka í økinum trívast lið um lið. Tískil er hetta kjarnumálið í eini væleydnaðari ferðavinnuætlan. Fyri at náa hesum máli er neyðugt at arbeiða miðvíst og skipað við menning av ferðavinnuni í samstarvi við ymiskar aktørar og við atliti til burðardygd og lokalan ognarskap.



Ein liður í arbeiðinum at stimbra menningarmøguleikar í økinum, hevur verið at umrøða evnið á almennum borgarafundum, ið vórðu hildnir kring Norðoyggjar í sambandi við ferðavinnuætlanina. Á hesum fundum varð samskift við borgarar um teirra sjónarmið, hugskot og ynski til ferðavinnuna, samstundis sum arbeitt hevur verið við at varpa ljós á møguleikar í lokalumhvørvinum.

Hendan tilgongdin hevur longu ført til fleiri nýggj hugskot og møgulig ferðavinnutilboð, sum kunnu menna og styrkja ferðavinnuna í økinum, og sum eru kjølfest í teimum, sum liva og virka í lokalsamfelagnum.

**Ein livandi tilgongd**

Í tilgongdini at menna kommunalu ferðavinnuætlanirnar, hevur stórur dentur verið lagdur á at styrkja lokala sjálvræði í einstøku økjunum. Arbeitt hevur verið miðvíst við at tryggja umboðandi hoyringartilgongdir, har heimafólk, bøndur, hagastýri, vinnulív og aðrir viðkomandi partar eru tikin við.

Endamálið er at leggja eitt trygt og haldført grundarlag undir einari burðardyggari ferðavinnuætlan, ið er ment í samljóði við lokalsamfeløgini og við virðing fyri náttúru, mentan og verandi virksemi í økinum. Hetta styrkir ognarskapin og samstarv um tey átøk og tær menningarætlanir, sum kommunurnar arbeiða við at fremja og menna ferðavinnuna eftir.

Tilgongdin styrkir ikki bert ognarskapin og samstarv, men tryggjar eisini, at tørvir og menningarátøk í ferðavinnuætlanini byggja á royndir og upplivingar hjá teimum, ið liva og virka í økinum. Tískil avspegla hesi átøk veruliga tørvin í lokalumhvørvinum, sum leggur trýst á kommunurnar um at arbeiða miðvíst eftir at røkka ásettum málum. Hetta styrkir grundarlagið undir bæði trivnaðinum hjá borgarum og einari langskygdari menning av ferðavinnuni.

Hetta er fyrstu ferð, at kommunurnar hava samstarvað um eina felags ferðavinnuætlan, og somuleiðis fyrstu ferð, at lokalir áhugabólkar – herundir heimafólk, festarar og hagastýri – verða tikin við í menningartilgongdina. Hetta krevur eina hugburðsbroyting, har allir partar mugu laga seg til eitt meira skipað og samskipað samstarv og virkið lata sítt íkast til menningina.

Visit North miðar tí eftir, at ferðavinnuætlanin skal virka sum ein livandi og dynamisk ætlan. Hetta merkir, at arbeiðið bæði fevnir um at fremja ítøkilig átøk, men eisini at tryggja eina støðuga eftirmeting og tillaging av málum og átøkum í takt við, at samfelagsviðurskifti og tørvir broytast.

Fyri at varðveita sambandið við lokalsamfeløgini verður dentur lagdur á regluligar borgarafundir og skipaðar hoyringar, har viðkomandi partar fáa høvi at koma til orðanna. Samstundis verður ferðavinnuætlanin javnan eftirmett við atlit at ávirkan, úrsliti og nýggjum ella broyttum tørvum, soleiðis at ætlanin framhaldandi er viðkomandi, burðardygg og gagnlig fyri bæði borgarar, vinnu og vitjandi.

**Ein samskapað ferðavinna**

Visit North umboðar allar kommunurnar í Norðoyggjum, tískil hava kommunurnar eitt felags bindilið til ferðafólkini, sum vitja í Norðoyggjum.

Visit North arbeiðir støðugt við at stuðla smáum aktørum, sum eru ein týdningarmikil partur av ferðavinnuni. Ein av styrkjunum í økinum er, at pláss er fyri bæði stórum og smáum aktørum, og at hesir samstarva – til dømis við ferðaleiðarar, matstovur og heimablídni.

Allir aktørar eru týdningarmiklir, og eru við til at menna ferðavinnuna og mynda samleikan í lokalsamfelagnum. Tí er tað umráðandi, at Visit North arbeiðir miðvíst við at skapa karmar, sum stuðla undir menning av ferðavinnutilboðum til frama fyri einstøku lokalu økini, sum Visit North umboðar.

Hetta verður bæði gjørt í dagliga virkseminum, men eisini í samstarvi við Íverksetarahúsið, sum hevur góðar møguleikar at stuðla ferðavinnumenning. Stovnurin er ein týðandi liður í at stimbra nýskapandi íverksetaraumhvørvið við at veita samstarv, sparring og vegleiðing til aktørar, ið ynskja at menna nýggj tilboð.



# *Felags skilhaldsreglur um ferðslu í haga við atliti at trygd og landbúnaðarvirksemi*

Visit Faroe Islands lýsir Norðoyggjar á hendan hátt:

***„Her eru fjøllini hægri, hamrarnir grefligari, og veðrið meira óútrokniligt. Ein fjallatúrur í Norðoyggjum er ikki fyri sartar sálir. Og tað er júst tað, sum lokkar. Tey, sum ganga øll fjøllini í landinum (tann listin telur 340 fjøll) hava eisini ein annan lista: Topp 10-listan, sum fevnir um tíggju tey hægstu fjøllini í landinum. Sjey teirra eru at finna í Norðoyggjum.“***

Náttúran í Norðoyggjum er serstøk og samstundis krevjandi. Tað hevur mangan kravt dirvi og hegni av norðoyingum at fáa náttúrutilfeingið til vega, og mangan hevur prísurin verið høgur. Høgu og brøttu fjøllini eyðmerkja bæði umhvørvið og felags vandar, sum allar oyggjarnar kenna avleiðingarnar av. Hetta er ein felags avbjóðing fyri allar Norðoyggjarnar. Á hesum grundarlagi verður mett, at tørvur er á felags og samskipaðum skilhaldsreglum, sum í høvuðsheitum taka atlit at trygd og landbúnaðarvirksemi.

Skilhaldsreglar eru eitt amboð at vegleiða, kunna og verja. Allar oyggjarnar hava líknandi avbjóðingar og deila somuleiðis eina kunningarstovu, sum ger tað natúrligt, at kunningarstovan hevur ein samskipandi leiklut í at skipa fyri eini felags tilgongd í samstarvi við kommunur og aðrar viðkomandi partar.

Skilhaldsreglurnar, við trygd fyri eygað, skulu kunna ferðafólk um ynskiligan atburð, tá ferðast verður í haganum, og vísa á, hvørji atlit eru neyðug at taka fyri at ferðast trygt.

Somuleiðis skulu skilhaldsreglur eisini verja landbúnaðarvirksemið. Hetta fevnir bæði um møguligan stongsil ella serlig atlit í ávísum tíðarskeiðum, eitt nú í lembingartíð, hárutíð og tá fjøllini verða gingin.

Eisini skulu reglurnar greiða frá, hvussu ferðafólk taka atlit at náttúru og djóralívi, so sum at halda seg á merktum farleiðu og vísa varsemi nær reiðrum, umframt kunning og vegleiðing, sum kann stuðla undir at ferðast verður á ein tryggan og ábyrgdarfullan hátt. Hetta krevur, at kommunurnar og bøndur taka felags ábyrgd og skapa neyðugu karmarnar.

Skilhaldsreglurnar hava til endamáls at kunna ferðafólk, verja serstøku náttúruna og trivnaðin hjá teimum, ið liva og virka í økinum. Visit North skal, í samráð við kommunurnar og viðkomandi partar, samskipa og menna felags skilhaldsreglur, sum stuðla undir, at ferðafólk bæði kunnu ferðast trygt og eru væl upplýst um, hvussu tey best ferðast í økinum við virðing fyri náttúru, djóralívi og landbúnaði.

***Kommunurnar kunnu harumframt áseta serligar skilhaldsreglur, ið eru galdandi fyri einstøk øki.***




## Miðling av skilhaldsreglum

Skilhaldsreglurnar skulu vera greiðar og lættar at skilja, bæði fyri føroyingar og útlendsk ferðafólk. Tær skulu vera tøkar á fleiri málum og miðlast gjøgnum viðkomandi pallar, eitt nú kunningarstovur, heimasíður, talgildar loysnir og sjónlig skelti í økinum.

Málið er, at øll, ið ferðast í haganum hava atgongd til neyðuga kunning, áðrenn og meðan tey eru á ferð.

Ein samskipað tilgongd millum oyggjarnar er ein fortreyt fyri at skapa eina felags fatan og mannagongd í Norðoyggjum. Hetta kann minka um misskiljingar og gera tað léttari hjá ferðafólki at skilja, hvat verður væntað av teimum.

Í arbeiðinum við at menna og fremja skilhaldsreglurnar er neyðugt við tøttum samstarvi millum kommunur, bøndur, jarðareigarar, ferðavinnuna og aðrar viðkomandi partar. Hetta skal tryggja, at reglurnar eru væl grundaðar og taka hædd fyri teimum ymisku áhugamálunum, sum eru knýtt at nýtsluni av haganum.

Endamálið er at skapa javnvág millum at gera náttúruna atkomiliga fyri ferðafólki og samstundis tryggja, at hon verður vard, og at lívsgóðskan hjá teimum, ið búgva og virka í Norðoyggjum, verður varðveitt og styrkt.

## Landbúnaðarferðavinna

Samstarvið við viðkomandi partar um at menna felags skilhaldsreglur fyri gongd í haga og landbúnaðarvirksemi, kann leggja lunnar undir eitt styrkt og samskipað arbeiði við at menna landbúnaðarferðavinnu í Norðoyggjum.

Vaksandi ferðavinnan í Føroyum letur upp fyri nýggjum møguleikum innan landbúnaðin. Landbúnaðarferðavinna snýr seg í stuttum um at menna vørur og tænastur innan ferðavinnuna, sum taka støði í landbúnaðarvirksemi. Her verða landbúnaður og náttúra tætt samantvinnað við ferðavinnu, og hetta kann skapa virði fyri bæði ferðafólk og lokalsamfeløg. Samstundis hevur landbúnaðarferðavinna stóra savningarmegi og kann styrkja felagsskapin á staðnum.

Landbúnaðarferðavinna verður mett sum eitt gott íkast til burðardygt landbúnaðarvirksemi, tí hon víðkar um tað staðbundna virksemið og er við til at varðveita og menna siðbundna landbúnaðin gjøgnum nýggjar vørur, tænastur og samstarv.

Hetta slag av ferðavinnu stuðlar undir eina menning, har virðing fyri umhvørvinum, mentanini og staðbundnum tilfeingi er í miðdeplinum. Samstundis kann hon skapa nýggjar møguleikar fyri inntøkum og vinnuligari menning í økinum.

Tá ferðavinna og landbúnaður møtast, sæst ofta ein stór góðsku- og vørumenning. Í Føroyum hevur hetta millum annað ført við sær ein vaksandi eftirspurning eftir stuttfluttum føroyskum matvørum við høgari góðsku, serliga innan matstovuvinnuna. Somuleiðis er eftirspurningurin eftir føroyskari ull í stóran mun tengdur at ferðavinnuni, sum er við til at tryggja, at ullin í alsamt størri mun verður gagnnýtt.

## Closed for Maintenance

Eitt dømi um, hvussu burðardygg ferðavinnumenning kann fremjast í verki, er átakið Closed for Maintenance.

Visit Faroe Islands hevur síðani 2019 skipað fyri átakinum *Closed for Maintenance*. Í hesum sambandi hava sjálvboðin ferðafólk saman við føroyingum skrivað seg upp at luttaka í arbeiði við at viðlíkahalda gøtukervið, seta upp skelting og gera útsýnisstøð. Árliga ferðavinnuátakið hevur roynst serstakliga væl – ikki bert við atliti at ítøkiligu arbeiðsuppgávunum, men eisini sum ein liður í at savna fólk og at menna eina ferðavinnu í Føroyum, ið virðir náttúru, fólk og mentan.




Átakið er eitt gott høvi hjá kommunum, hagapørtum og øðrum at fremja neyðugar ábøtur og samstundis fyrireika økini til at taka ímóti ferðafólkum.

Visit North hevur eisini sera góðar royndir við at samskipa og leiða hesar verkætlanir í Norðoyggjum og hevur verið, og er framvegis, ein virkin samstarvspartur í hesum átakinum.

Millum annað varð ein verkætlan samskipað á Viðareiði, har fleiri hundrað trøð vórðu plantað. Verkætlanir hava eisini fevnt um arbeiði á hagagøtum í Klaksvík, Haraldssundi og Árnafirði. Í øllum førum hevur arbeiðið verið væleydnað og havt stóran týdning fyri lokala umhvørvið.

Visit North fer framhaldandi at hava ein virknan leiklut í at samstarva við kommunur og viðkomandi partar um at menna verkætlanir undir átakinum Closed for Maintenance, ið skapa menning og virði í Norðoyggjum.




**Heimsmálini**
Ferðavinnuætlanin er kjølfest í løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu, og tekur støði í altjóða málunum fyri burðardyggari menning, eisini nevnd Heimsmálini. Endamálið er at verja náttúruna og at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólki kring landið.

Sum liður í hesum arbeiði verða Heimsmálini nýtt sum ein strategiskur karmur fyri menningini av ferðavinnuni í Norðoyggjum. Hetta merkir, at ferðavinnuætlanin tekur atlit at bæði umhvørvisligum, sosialum og búskaparligum viðurskiftum, og at miðvíst verður arbeitt við eini ábyrgdarfullari og burðardyggari menning, sum gagnar bæði lokalsamfeløgunum og vitjandi.

Serligur dentur verður lagdur á tey heimsmál, sum hava beinleiðis týdning fyri ferðavinnuna. Hetta fevnir millum annað um at fremja trivnað, skapa sømilig arbeiðspláss og burðardyggan búskaparvøkstur, stuðla nýskapan og betra undirstøðukervi og menna burðardyggar býir og bygdir. Samstundis verður arbeitt við at tryggja ábyrgdarfulla nýtslu av náttúrutilfeingi og verja lívmargfeldið, soleiðis at náttúra og umhvørvi verða varðveitt til komandi ættarlið.

Eisini verður dentur lagdur á at styrkja luttøku og samstarv, bæði lokalt og tvørtur um geirar, fyri at tryggja eina felags og samanhangandi menning. Hetta fevnir um at menna inkluderandi avgerðargongdir, styrkja samstarv millum almennar og privatar partar og tryggja, at menningin av ferðavinnuni byggir á virðing fyri bæði fólki og náttúru.

Heimsmálini eru sostatt ein týðandi partur av grundarlagnum undir ferðavinnuætlanini og virka sum leiðreglur fyri, hvussu ferðavinnan í Norðoyggjum kann mennast á ein burðardyggan, ábyrgdarfullan og langskygdan hátt.

***Hesi heimsmál eru serliga viðkomandi fyri ábyrgdafulla og burðardygga ferðavinnuna.***




**Heimsmál 4:**
**Dygdargóð útbúgving**
Ferðavinnan skal vera við til at arbeiða fyri dygdargóðum útbúgvingum. Ferðavinnan kann vera við til at styrkja vitan og tilvit um náttúru, mentan og burðardygga ferðslu. Visit North arbeiðir millum annað við at menna skeið, sum kunnu útbúgva lokalar ferðaleiðarar, sum bæði kunnu miðla vitan og tryggja ábyrgdafullar og góðar upplivingar. Hetta styrkir bæði góðskuna í ferðavinnuni og førleikarnar í lokalsamfelagnum.




**Heimsmál 8:**
**Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur**
Ferðavinnan skal á burðardyggan hátt vera við til at skapa arbeiðspláss, styrkja lokala vinnu og menna búskapin, samstundis sum hon fremur lokala mentan, framleiðslu og vørur. Soleiðis kann ferðavinnan stuðla undir varandi, inkluderandi og burðardyggan búskaparvøkstur og fleiri arbeiðsmøguleikar.




**Heimsmál 9:**
**Vinna, nýskapan og undirstøðukervi**
Ferðavinnan skal stuðla undir menning av burðardyggum og haldgóðum undirstøðukervi og eggja til nýskapan og nýhugsan, sum styrkir bæði upplivingina hjá vitjandi og lokalsamfeløgum, trivnaði og búskaparligari menning.




**Heimsmál 11:**
**Burðardyggir býir og býlingar**
Ferðavinnan skal mennast á ein hátt, sum stuðlar undir burðardygga bý- og bygdarmenning, verjir mentanar- og

náttúruarv og tryggjar góð, inkluderandi, trygg og atkomilig almenn øki og tænastur til gagns fyri bæði borgarar og vitjandi.

**Heimsmál 12:**
**Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla**
Ferðavinnan skal mennast á ein ábyrgdarfullan og burðardyggan hátt, har náttúrutilfeingi verður umsitið skynsamt. Og har arbeitt verður fyri, at bæði borgarar og vitjandi hava góða kunning og tilvitan um burðardygga menning og lívsførslu í samljóði við náttúruna. Samstundis skal ferðavinnan mennast við atlit at ávirkan á náttúru, arbeiðspláss og lokalar vørur.

**Heimsmál 15:**
**Lív á landi**
Ferðavinnan skal mennast við virðing fyri náttúruni og lívmargfeldinum, og við átøkum, sum verja, endurbøta og varðveita náttúruøki, fyribyrja náttúrutýning og tryggja burðardygga nýtslu og umsiting av náttúrutilfeingi og vistfrøðiligum skipanum.

**Heimsmál 16:**
**Friður, rættvísi og sterkir stovnar**
Ferðavinnan skal mennast á ein hátt, sum byggir á opnar og inkluderandi avgerðargongdir, har borgarar og áhugapartar fáa møguleika at ávirka menningina, og sum stuðlar undir rættvísi, trivnaði og sterkum samfeløgum.

**Heimsmál 17:**
**Samstarv um heimsmálini**
Burðardygg ferðavinnumenning krevur gott samstarv millum kommunur, vinnu og borgarar, og samskipaðar politikkir, sum byggja á virðing fyri lokalum tørvi og sjálvræði.

Saman mynda heimsmálini eitt felags grundarlag undir ferðavinnuætlanini, sum bæði skapar virði fyri borgarar, vinnu og vitjandi, og samstundis tekur ábyrgd av náttúru, mentan og framtíðarmenning.



# *Ferðavinnu-ætlan fyri Kunoyar kommunu*

Kunoyar kommuna er ein serstakur partur av ferðavinnulandslagnum í Norðoyggjum. Stórslignað náttúran við høgu fjøllunum er lokkandi fyri mong. Bæði føroysk og útlendsk ferðafólk vitja í kommununi, serliga í Kunoy, meðan Haraldssund í størri mun er eitt stað, sum nógv bert ferðast ígjøgnum. Í Kunoy koma javnan bussar í bygdina við ferðafólki. Tey vitjandi leita sær oftast niðan í dalin eftir Nýggjavegi og í plantasjuna. Tað eru avmarkaðir møguleikar hjá ferðafólkum at nýta pening í kommununi, tí fá ella eingi skipað ferðavinnuútboð eru í økinum.

Ferðafólkatalið í kommununi er sostatt munandi størri, enn tað fíggjarliga virðið, sum ferðavinnan hevur fyri lokalsamfelagið í dag. Flestu vitjandi steðga stutt, njóta náttúruna og økið, men leggja lítið ella einki fíggjarligt eftir seg í lokalsamfelagnum. Hetta bendir á, at grundarlag er fyri at menna ferðavinnuna meira skipað og málrættað, soleiðis at hon í størri mun kann koma bæði borgarum og kommununi til gagns.

Miðað verður eftir, at ferðavinnan í Kunoyar kommunu verður ment á burðardyggum grundarlagi, har atlit verða tikin at náttúru, trygd, trivnaði, landbúnaðarvirksemi og gerandisdagin hjá borgarunum. Ferðavinnan skal mennast í samljóði við tey, sum liva og virka í kommununi, og samstundis gera kommununa meira innbjóðandi og atkomiliga fyri vitjandi. Málið er at skapa eina vitjanarverda kommunu, har bæði borgarar og vitjandi trívast.



Kunoyar kommuna

Arbeiðið við ferðavinnuætlanini hevur víst á bæði menningarmøguleikar og ítøkiligar avbjóðingar. Dentur hevur verið lagdur á, at menningin skal byggja á staðbundnar fortreytir og mennast í tøttum samstarvi við borgarar, hagapartar, kommunu og aðrar viðkomandi partar. Á tann hátt kann ferðavinnan mennast sum ein jaligur partur av lokalsamfelagnum, sum bæði stuðlar trivnaðinum og skapar nýggjar møguleikar.

# *Ferðavinnumenning sum íløga í lokalsamfelagið*

Enn er stórur munur á talinum av vitjandi og fíggjarliga ágóðan, sum kommunan fær burtur úr ferðavinnuni. Men mongu vitjandi eru gott grundarlag undir víðari menning av ferðavinnuni, og kunnu kveikja íverksetaraneistan hjá borgarum og øðrum aktørum, sum síggja hópin av møguleikum í staðbundna tilfeinginum, sum náttúran og landbúnaðarvirksemi hava at bjóða.

Menning av ferðavinnutilboðum kemur ikki bert ferðafólkum til góðar, men eisini borgarum og lokalsamfelagnum sum heild. Harumframt kann ferðavinnan samstundis vera ein íløga í at varðveita og varpa ljós á føroyska mentan, staðbundin virði og tað serstaka tilfeingið, sum eyðkennir Føroyar.

Ferðavinnan kann sostatt eisini verða eitt amboð til at menna og styrkja lokalsamfelagið, serliga tá staðbundnir aktørar fáa gagn av teimum vitjandi. Tá ferðavinnan verður ment við støði í staðbundnum fortreytum, kann hon bæði skapa trivnað, nýggjar møguleikar og vaksandi virksemi í nærumhvørvinum.

Tí verður mett, at gott grundarlag er fyri at menna fleiri ferðavinnutilboð í kommununi. Hetta kann eitt nú gerast við at gagnnýta tað, sum náttúran og landbúnaðurin hava at bjóða, og við at menna og selja skipaðar upplivingar, túrar við ferðaleiðara, matpakkar og líknandi.

**Samstarv sum grundarsteinur undir ferðavinnuni**

Ferðavinnan er í stóran mun treytað av góðum samstarvi millum ymiskar aktørar. Fyri at menna og styrkja ferðavinnuna í kommununi er avgerðandi, at bæði almennir og privatir aktørar samstarva um at menna tilboð, skapa góðar karmar og tryggja eina samanhangandi, burðardygga og dygdargóða uppliving fyri vitjandi.

Fleiri aktørar í kommununi hava góð hugskot og ætlanir, sum kunnu gerast til verulig ferðavinnutilboð. Fyri at stuðla undir, at hugskot gerast til veruleika, arbeiðir Visit North saman við Íverksetarahúsinum við at skipa fyri skeiðum innan produktmenning. Endamálið er at geva teimum, ið hava hug og førleikar at menna nýggj tilboð, amboð og vitan um, hvussu komið verður frá hugskoti til veruliga vøru, herundir prísáseting og onnur viðkomandi viðurskifti.

Harumframt kann Visit North eisini vera við til at miðla og selja staðbundnar upplivingar og vørur fyri privataktørar. Hetta kann bæði gerast ein týdningarmikil stuðul fyri lokalar ferðavinnuveitarar og grundarlag fyri framtíðar íverksetan í kommununi.













### Staðbundin ferðavinnutilboð og upplivingar í Kunoy

Ávís tíðarskeið er møguligt at uppliva spennandi tiltøk á Kunoynni, sum privatpersónar skipa fyri.

Í Kunoy er møguligt at fara til øðrvísi listaframsýning í summarhúsum - ein serstøk uppliving.

Í Kongsstovuni í Haraldssundi hava tey fjøltáttað virksemi. Bóndahjúnini luttóku fyri stuttum í átakinum Nýskapan í ferðavinnuni, sum Hugskotið, Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands skipaðu fyri. Í hesum sambandi arbeiða tey við at menna ymiskar forvitnisligar og forkunnugar vørur. Ferðavinnan hevur teirra áhuga, og verkætlanir eru í umbúna.

Airbnb og líknandi privat útleiga eru eisini ein partur av tilboðunum í kommununi og geva vitjandi fleiri møguleikar fyri gisting.

Hetta vísir, at staðbundnir aktørar síggja møguleikar í at menna upplivingar og tilboð, sum taka støði í lokala umhvørvinum og mentanini.

Í djóragarðinum í Kunoy er møguligt at uppliva ein heilt serligan og øðrvísi djóragarð. Ávís tíðarskeið í árinum er møguligt at vitja eitt vanligt føroyskt heim, sum tó er nógv øðrvísi enn tey flestu. Hetta er heimið hjá Elianu og familju hennara, sum eisini er ein sokallaður djóragarður. Har býr ein familja saman við nógvum ymiskum djórum, og vitjandi fáa tí eina serliga uppliving av einum føroyskum heimi og djórum. Eisini er møguleiki fyri at keypa sær okkurt leskandi og søtt.







### Almennar farleiðir og hentleikar

Ein partur av ferðavinnuætlanini er at tryggja, at almennar farleiðir og hentleikar, sum eru opnir fyri almenninginum, verða víst á korti. Hetta fevnir um meginfarleiðir, atkomuviðurskifti, parkeringsmøguleikar, almenn vesi, kunningarstøð og aðrar gøtur og øki.

Í hesum sambandi eru kort gjørd fyri báðar bygdirnar í Kunoyar kommunu. Kortini skulu virka sum eitt amboð til kunning og vegleiðing, og kunnu nýtast bæði talgilt og í prentaðari útgávu. Tey kunnu leggjast á heimasíður hjá viðkomandi stovnum og samstarvspørtum, umframt prentast til vitjandi, til dømis gjøgnum Visit North.

Við slíkum kortum verður grundarlagið styrkt fyri eini betri og skipaðari móttøku av vitjandi, samstundis sum stuðlað verður undir eina greiðari og meira atkomiligari ferðauppliving í kommununi.

Eisini er møguligt at veita aðra viðkomandi kunning til ferðafólk saman við kortunum, herundir skilhaldsreglur, avmarkingar og vegleiðing um tryggan og burðardyggan atburð í náttúruni.

## Bygdagøtur

Sambært galdandi lóggávu kunnu ferðafólk bert ferðast undir egnari ábyrgd á bygdagøtum, útvaldum hagagøtum og fram við strondini. Visit Faroe Islands almannakunnger og merkir leiðirnar við torleikastigi, so merkingarnar eru sambæriligar.

Í Kunoyar kommunu er bert ein almenn bygdagøta/hagagøta, tað er leiðin millum Haraldssund og Skarð.

Millum heimafólk, staðkend og roynd hagagongufólk er breið semja um, at leiðin ikki er trygg hjá ferðafólkum at ferðast eftir undir egnari ábyrgd. Gøtan er ov vandamikil til almenna farleið, og tí eigur hon at verða tikin av sum almenn farleið.

Avbjóðingarnar eru serliga stórar í vetrarhálvuni. Leiðin kann gerast sera vandamikil, tá hella frystir, og nógv regn ger lendið hált og torført at ferðast í. Í fleiri støðum er gøtan annaðhvørt illa farin ella nærum ósjónlig. Eisini er leiðin so mikið long, at tað er avbjóðandi at náa fram og aftur í dagsljósi stóran part av árinum.




Harumframt ganga stór djór frítt í økinum fram við gøtuni, og til tíðir hava hesi elt fólk. Hetta skapar eisini álvarsligar trygdaravbjóðingar og kann føra til vandamiklar støður hjá teimum ferðandi.

Á hesum grundarlagi verður mett, at ferðafólk bert eiga at ferðast í hesi farleið saman við staðkendum ferðaleiðara. Gøtan eigur tí ikki at vera skrásett sum almenn bygdagøta á heimasíðuni hjá Visit Faroe Islands ella á øðrum almennum kortum.

Á kortinum niðanfyri sæst einasta almenna farleið uttangarðs á Kunoynni.

## Trygg ferðsla í fjøllunum

Høgu fjøllini á Kunoynni seta ein heilt serligan dám á økið, og eru ein týðandi partur av upplivingini hjá vitjandi. Samstundis eru fjøllini eisini ein av størstu avbjóðingunum, tá tað kemur til trygd. Í nógvum støðum er lendið krevjandi við brøttum líðum og leysum gróti, og í fleiri hagapørtum er ikki ráðiligt at ferðast uttan staðkendan ferðaleiðara.

Hóast hesar avbjóðingar, eru fjøllini sera dragandi fyri nógv ferðafólk. Hetta merkir, at summi fara í hagan uttan neyðuga fyrireiking, hóskandi útgerð ella atliti at skiftandi veðurlagi, ið eyðkennir Føroyar. Hetta kann skapa vandastøður, sum heimafólk, ið kenna økið og treytirnar, ofta hava ampa av.

Miðað verður eftir, at øll vitjandi kunnu njóta stórslignu náttúruna á ein tryggan hátt. Hetta krevur, at kommunan tekur ábyrgd, og hevur ein virknan leiklut í at menna eitt greitt rammuverk, sum skipar og stýrir ferðsluni í haganum. Ein møguleiki er at knýta ein størri part av ferðsluni at skipaðum túrum og ferðavinnuvirksemi, so sum túrum við góðkendum ferðaleiðarum og øðrum skipaðum upplivingum. Hetta kann bæði økja um trygdina og skapa størri inntøkur í lokalsamfelagnum.





hava ein leiklut í at góðkenna staðkendar ferðaleiðarar, soleiðis at tryggjað verður, at teir hava neyðuga vitan og førleikar at leiða ferðafólk í økinum.

Tað eru ymiskir hættir at skipa hetta arbeiðið. Arbeitt verður við eini møguligari loysn, har kommunurnar í Norðoyggjum samstarva um, at Visit North skipar fyri ferðaleiðaraskeiðum. Endamálið við hesum er at útbúgva staðkendar og góðkendar ferðaleiðarar, sum hava neyðuga vitan um økið og førleikar at taka ímóti og vegleiða vitjandi á ein tryggan hátt. Hesi skeið kunnu eisini fevna um fyrstuhjálp.

### Smidlig og skipað ferðsla í haganum

Ein liður í at skipa, hvar fólk ferðast í haganum, er eisini at tryggja góðar og greiðar karmar fyri, hvar og hvussu fólk ferðast. Hetta er avgerandi fyri bæði upplivingina hjá vitjandi og fyri at verja náttúru, djóralív og landbúnaðarvirksemi.

Ein av størstu avbjóðingunum er knýtt at hegnum og atgongdini. Á oynni eru nógv hegn, men fá hagaportur eru at ganga ígjøgnum. Hetta ger ferðslu uttangarðs truplari og kann skapa trupulleikar fyri djóralív, landbúnað og skipaða ferðslu.

Ábyrgdin av at hegna og seta upp hagaportur liggur hjá hagapørtunum. Kortini er tørvur á at arbeiða meira miðvíst við hesum, so at atgongdin verður betri skipað og meira atkomilig, uttan at tað gongur út yvir landbúnaðin.

Somuleiðis er tørvur á greiðari skelting við hagaportrini. Hetta skal tryggja, at ferðafólk fáa greið boð um, at portur altíð skulu latast aftur. Í hesum sambandi kann eisini vera viðkomandi at hava kunning um serlig atlit, sum skulu takast í ávísum økjum.

Tí er neyðugt at kanna nærri, hvar tørvur er á fleiri hagaportrum, og í hesum sambandi menna loysnir, sum taka atlit at bæði vitjandi og teimum, ið varða av haganum, samstundis sum tær verja djóralív, náttúru og landbúnaðarvirksemi.

Tað er samstundis neyðugt at gera eina nærri greining av ítøkiliga tørvinum í einstøku økjunum og hagapørtunum, fyri at eyðmerkja hvar og hvussu avmarkingar eiga at setast. Hetta eigur at gerast við atliti at náttúruviðurskiftum, trygd og burðardygd.

Í hesum sambandi er eisini týdningarmikið at taka hædd fyri rættinum hjá føroyingum at ferðast frítt í egnum landi. Tí eigur arbeiðið at miða eftir at finna eina javnvág millum trygd, atkomu, lóggávu og lokal ynski, soleiðis at góðar og burðardyggar ferðvinnuloysnir verða mentar.

### Skipað ferðsla uttangarðs

Greitt ynski er um at menna eina skipaða og burðardygga ferðavinnu í Kunoyar kommunu. Hetta setur krøv til, at ferðslan í náttúruni verður skipað á ein ábyrgdarfullan hátt, og at ferðafólk fáa møguleika at taka lut í skipaðum túrum við ferðaleiðara.

Tí verður arbeitt miðvíst við at menna og styrkja útboðið av skipaðum túrum í náttúruni. Endamálið er bæði at stýra ferðsluni í haganum og samstundis at tryggja, at ferðafólk kunnu ferðast á ein tryggan og upplýstan hátt í einum landslagi, sum á mangan hátt kann vera krevjandi.

Við at tryggja eitt nøktandi og atkomuligt útboð av skipaðum túrum verður miðað eftir at minka um óskipaða ferðslu uttangarðs. Hetta ger, at ferðafólk í størri mun velja at uppliva náttúruna saman við staðkendum ferðaleiðarum, sum kunnu tryggja bæði trygd, dygd og virðing fyri náttúru og lokalsamfelagi.

Somuleiðis verður arbeitt við at menna reglulig ferðavinnutilboð, sum skipa virksemið, skapa inntøkur og tryggja dygdargóðar og tryggar upplivingar.

### Ferðaleiðarar og staðkunnleiki

Trygd í náttúruni er eitt afturvendandi og grundleggjandi evni, tá ferðavinnan verður umrødd. Tengt at hesum er tørvurin á góðum ferðaleiðarum, serliga tá ferðast verður í haga og á krevjandi leiðum, sum eyðkenna fleiri av leiðunum í norðurøkinum.

Sambært galdandi reglum skulu ferðaleiðarar vera staðkendir, hava hollan kunnleika til økið og fyrstuhjálp. Fyri at taka ábyrgd og góðskutryggja ferðaleiðaravirksemið varð lagt fram, at kommunan eigur at taka ábyrgd og

# Grundleggjandi hentleikar sum fortreyt fyri ferðavinnumenning

### Parkerings- og vesiviðurskifti

Parkering og vesiviðurskifti eru grundleggjandi hentleikar, sum hava stóran týdning fyri, hvussu væl kommunan megnar at taka ímóti vitjandi og hýsa borgarum. Somuleiðis eru hesir hentleikar eisini ein týðandi partur av ferðavinnumenningini, tí teir hava beinleiðis ávirkan á, hvussu atkomilig og væl skipað upplivingin í kommununi er.

Í Haraldssundi er hvørki alment parkeringsøki ella alment vesi. Í Kunoy er alment vesi, men hetta lýkur ikki treytirnar fyri almennum vesi, tí atkomuviðurskiftini gera, at fólk, ið ikki megna at ganga í trappum, ikki hava møguleika at nýta tað.

Talan er um grundleggjandi hentleikar, ið hava týdning fyri bæði borgarar og vitjandi. Tí er neyðugt at raðfesta hetta økið og arbeiða víðari við at betra um umstøðurnar. Hetta fevnir um at kanna møguleikarnar fyri almennum vesum bæði í Haraldssundi og Kunoy, umframt at tryggja, at hesi eru atkomilig fyri øll.

Somuleiðis er tørvur á at meta um og menna betri parkeringsmøguleikar í báðum økjunum, so móttøkan av vitjandi verður meira skipað. Hetta verður raðfest sum ein liður í at styrkja almennu hentleikarnar í økinum og samstundis styrkja grundarlagið undir ferðavinnuni.



### Skelting sum amboð

Góð skelting er eitt týðandi amboð til at kunna og vegleiða ferðafólk, samstundis sum hon er ein liður í at vísa virðing fyri lokalsamfelagnum, bygdafólki og náttúruni. Skelting kann sostatt betra um upplivingina hjá bæði vitjandi og stuðla undir trivnaðin hjá teimum, ið búgva í kommununi.

Tørvur er á at styrkja skeltingina í kommununi. Serliga er tørvur á vegleiðandi skelting, sum vísir ferðafólkum rætta leið og leiðir ferðsluna á skipaðan hátt, men eisini er tørvur á upplýsandi skelting, sum gevur kunning um reglur, atlit og staðbundin viðurskifti. Hetta er avgerandi fyri at skapa eina greiða og samanhangandi móttøku av vitjandi.

Tí er neyðugt at arbeiða miðvíst við at menna eina greiða og samanhangandi skelting í kommununi. Hetta fevnir um at kortleggja tørvin á skelting á ymiskum støðum og tryggja, at skeltingin er greið, samanhangandi og løtt at skilja.

Ein væl skipað skelting kann vera við til at vegleiða ferðafólk, fyribyrgja trupulleikum og samstundis tryggja, at atlit verða tikin at bæði náttúru og lokalsamfelagnum. Soleiðis verður skelting ein týðandi partur av at stýra ferðsluni og styrkja grundarlagið undir einari burðardyggari ferðavinnu.





# Skilhaldsreglur

Við vaksandi ferðavinnu er tørvur á greiðum karmum fyri, hvussu ferðafólk bera seg at í smáum lokalsamfeløgum. Skilhaldsreglur eru eitt týdningarmikið amboð til at skipa ferðslu og vegleiða um atferð í økjum, har nógv ferðafólk vitja, soleiðis at ferðavinnan fer fram við virðing fyri heimafólki, náttúru og staðbundnum siðum. Sambært galdandi reglum er møguligt at áseta slíkar reglur, sum øll vitjandi, eisini føroyingar, skulu fylgja.

Í bygdini Kunoy merkja heimafólk, serliga í gamla bygdapartinum, í vaksandi mun avleiðingarnar av nógvu ferðafólkaferðsluni. Heimafólk uppliva, at ferðafólk ofta ikki virða skelting, privat øki og staðbundnar normar. Dømi eru um, at ferðafólk fara inn í seyðahús og onnur úthús uttan loyvi, hyggja inn gjøgnum vindeygu hjá fólki og gera seg inn á veltur við at venda flagi av forvitni. Slík atferð verður av heimafólki upplivað sum órógvandi og sum manglandi virðing fyri privatlívi, ognum og staðbundnum siðum.

Umframt felags skilhaldsreglurnar fyri ferðslu í haga í Norðoyggjum, við atliti at trygd og landbúnaðarvirksemi, er tørvur á at orða staðbundnar skilhaldsreglur fyri Kunoy. Tørvur er tí á at orða greiðar og staðbundnar skilhaldsreglur fyri Kunoy, sum kunnu vegleiða ferðafólkum um, hvussu tey eiga at bera seg at í bygdini og nærumhvørvinum. Endamálið við slíkum reglum er at tryggja eina betri javnvág millum ferðavinnu og lokalsamfelag við virðing fyri heimafólki, privatari ogn og staðbundnum siðum.

Í samstarvi við lokalsamfelagið, bøndur og viðkomandi myndugleikar fer kommunan tí undir at orða og seta í verk serstakar skilhaldsreglur fyri Kunoy. Dentur verður somuleiðis lagdur á greiða kunning og týðiliga skelting, soleiðis at ferðafólk fáa greið boð um, hvørjar reglur galda, og hvussu tey eiga at bera seg at. Hetta kann viðvirka til, at lokalsamfelagið og ferðavinnan trívast enn betur lið um lið.

# Samandráttur

Ferðavinnuætlanin fyri Kunoynna hevur til endamáls at menna eina burðardygga og væl skipaða ferðavinnu, samstundis sum samstarvið millum kommununa og aðrar viðkomandi partar verður styrkt.

Kunoyar kommuna hevur ein stóran, men enn lítið gagnnýttan møguleika innan ferðavinnu. Nógv vitjandi koma longu í økið, men við eini greiðari og málrættaðari menning kann størri virði skapast lokalt – bæði fíggjarliga og sosialt.

Dentur verður lagdur á at menna ferðavinnuna á einum burðardyggum grundarlagi, har atlit verða tikin til náttúru, trygd, djóralív, landbúnað og trivnaðin hjá borgarunum. Samstundis er tørvur á at skapa greiðar karmar fyri ferðslu í náttúruni, styrkja samstarvið millum almennar og privatar aktørar og gera tað lættari hjá íverksetarum at menna nýggj tilboð.

Eisini er neyðugt at betra um grundleggjandi hentleikar sum parkering, vesiviðurskifti og skelting, umfram at menna ferðaleiðaravirksemi og skipaðar upplivingar. Hetta skal tryggja eina betri, tryggari og meira samanhangandi uppliving fyri vitjandi, og samstundis skapa møguleikar fyri, at lokalsamfelagið fær størri ágóðan av vitjandi.

Við greiðum raðfestingum, góðum samstarvi og virðing fyri staðbundnum virðum kann Kunoyar kommuna menna eina ferðavinnu, sum bæði er burðardygg, skapar inntøkur og styrkir lokalsamfelagið til gagns fyri bæði borgarar og vitjandi.



**Í Kunoyar kommunu verður í høvuðsheitum arbeitt víðari við at:**

- menna ferðavinnuna á einum burðardyggum grundarlagi, sum tekur atlit at náttúru, trygd, djóralívi, landbúnaðarvirksemi og lokalsamfelagi
- menna karmar, sum stuðla undir, at ferðsla í náttúruni verður meira skipað og trygg
- styrkja samstarvið um ferðavinnuna millum almennar og privatar aktørar
- skapa karmar í kommununi, sum stuðla undir, at privatir aktørar kunnu reka ferðavinnu
- gera tað møguligt hjá ferðafólkum at leggja pening eftir seg í kommununi
- finna loysn til at gera almennu gøtuna millum Haraldssund og Skarð tryggari at ferðast eftir
- áseta avmarkingar og skilhaldsreglur, sum stuðla undir, at fólk ferðast trygt í náttúrini
- menna ferðaleiðaraskeið
- betra um parkeringsviðurskifti
- betra um almenn vesiviðurskifti
- betra um skelting og kunning
- orða skilhaldsreglur fyri Kunoyar bygd

VISIT
NORTH

visitnorth.fo